# Vónin ment nýtt kongafiskatrol

**Tá ið Fagraberg fríggjadagin landaði eina stóra last av kongafiski í Fiskavirking á Tvøroyri, høvdu teir eitt nýtt trol umborð. Talan er um eitt nýliga ment kongafiskatrol, sum p/f Vónin hevur framleitt. Fagraberg tók trolið við á hendan túrin, so at síggjast kundi, hvussu tað roynist**

TROLVEIÐA

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Tá ið Fagraberg fríggjadagin landaði eina stóra last av kongafiski í Fiskavirking á Tvøroyri, høvdu teir eitt nýtt kongafiskatrol umborð. Fagraberg royndi nýggja trolið, sum p/f Vónin hevur ment*

Rógvi Joensen er sølumaður á Vónini, og hann letur sera væl at hesum fyrsta túrinum:

– Úrtøkan var sera góð, og vit eru væl nøgdir. Vit hava roynt í fleiri ár at menna eitt trol, sum kann brúkast til kongafisk, men tað skal ein serlig tøkni til. Tey eru sera stórmeskaði, og talan er um løtt flótitrol. Tað er roynt at fiska kongafisk við svartkjaftatrolið, men tað riggaði ikki.

Vónin ætlar sær at arbeiða víðari við trolinum, og teir hava ætlanir um at gera seg galdandi á altjóðamarknaðinum.

– Íslendarar eru fremst innan tílík trol, men vit meta, at vit hava eitt gott trol, og vit ætla at taka kappingina upp og koma inn á marknaðin, sigur Rógvi, sum sjálvur var við Fagraberg á túrinum, har ið trolið varð ment.

Rógvi sigur, at teir hava fingið fleiri fyrispurningar um nýggja trolið. Tað eru eisini útlendingar, sum hava sýnt áhuga fyri hesum. Hann fegnast eisini um, at nýggja trolið kann vera við til at geva arbeiði í Suðuroy.



*Nógv fólk vóru til Nósaføðingardag í høllini á Hálsi leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nósaføðingar-dagur í Havn

Leygardagin var nósaføðingardagur í høllini á Hálsi. Øll børnini, sum hava tømt teirra Nósa í Føroya Banka, fingu atgongumerki til tiltakið klokkan trý í dag.

Í høllini var hoppiborg og onnur skemtilig tilboð. Angela og Hannibal bjóðaðu vælkomin. Landsliðsmálmaðurin Jákup Mikkelsen var har og skrivaði autografar. Meyla og Knøttur undirhildu. Eisini var ymiskt til matna, og ballónir vóru ríkiligt av.

Sí myndatema frá nósaføðingardegnum á portal.fo.

**- heinik**

# John Johannesen við á týðandi friðarfundi

**Løgtingslimurin John Johannesen fekk høvi at vera vitni til slóðbrótandi ST-trygdarfund. Fundurin verður mettur sum eitt týðandi stig móti friði í Miðeystri**

ST-TRYGDARFUNDUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*John Johannesen, løgtingslimur fyri Javnaðarflokkin, er í hesum døgum í New York við trygdarráðnum*

John Johannesen, løgtingslimur fyri Javnaðarflokkin, er í hesum døgum í New York við trygdarráðnum. Hann fekk fríggjadagin møguleikan at vera við til ein fund hjá ST-trygdarráðnum, sum gav eitt óvæntað gott úrslit. Fundurin var um spentu støðuna í miðeystri og serliga um støðuna millum Palestina og Ísrael. Umboð fyri londini vóru á fundinum, og óttast varð frammanundan fyri, at úrslitið ikki fór at verða gott, tí at partarnir vóru so langt frá hvørjum øðrum. Men John Johannesen var fyrstahondsvitni til, at úrslitið av fundinum var betri enn væntað:

– Umboðini tosaðu sama mál. Hetta verður nú umtalað sum eitt stórt stig móti friði í Miðeystri. Báðir partar tosaðu um virðing fyri hvørjum øðrum, og vóru eisini samdir um eina tvítjóðaloysn, so at friður er í eygsjón, sigur John.

– Fundurin verður her yviri umtalaður sum eitt frambrot, og eg eri sera errin av, at eg var á hesum týðandi fundinum, sigur John.

John Johannesen hevur á ferðini annars sæð kendar menn sum Kofi Annan og George W. Bush og tosað við týðandi menn, sum taka stórar avgerðir.

# Fyrilestur um kristindóm í Trongisvági

TRÚARLÍV

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

KFS (Kristiligur Felagsskapur fyri Skúlaungdóm) hevur í hesi vikuni fingið vitjan úr Danmark. Tað er danski KFS-skrivarin og bibliuskúlalærarin, Frank R. Kristensen, ið er útbúgvin gudfrøðingur, sum vitjar. Í sambandi við at hann í morgin vitjar í Suðuroynni, hevur Frank fyrilestur í skúlahøllini í Trongisvági týskvøldið kl. 20. Evnið er: "Kristindómur – ein neyðug rættleiðing til nútíðar menniskja?"

– Kristindómurin hevur svar upp á teir stóru spurningarnar í tilveruni, sum menniskju í dag tíverri hava gloymt at sett. Fokus verður á teimum stóru spurningunum í tilveruni, sum t.d. "Hvør er meiningin við lívinum?" og "Hvussu hugsar tú um deyðan?" – og svarunum hjá kristindóminum. Øll – eisini tilkomin og eldri – eru hjartaliga vælkomin til hendan áhugaverda fyrilesturin. Tiltakið er ókeypis, stendur í tíðindaskrivi frá KFS-Føroyar.

Hesa vikuna vitjar Frank R. Kristensen annars ymsar miðnámsskúlar um landið, har hann undirvísir í religión, hevur andaktir og fundir. Í dag skal Frank undirvísa á studentaskúlanum á Kambsdali, í morgin verður hann á miðnámsskúlanum í Vági, og hósdagin undirvísir hann aftur á Kambsdali og í Hoydølum. Fríggjadagin og leygardagin undirvísir Frank á ungdómsleiðaraskeiðnum í Nesvík, sum Heimamissiónsungdómur skipar fyri saman við KFS. Sunnudagin fer hann aftur til Danmarkar.